## Oljuleiting í valstríðnum



Í Íslandi noyddist flokkurin Vinstri Grøn at koma við einari rættleiðing, eftir at Kolbrún Halldórsdóttir, umhvørvismálaráðharri, hevði sagt í einari útvarpssending, at flokkur hennara er ímóti, at leitað verður eftir olju á Drekaleiðini, sum er nakað norðan fyri Ísland. Nakrar tímar seinni kom ein fráboðan frá Vinstri Grønu. Har varð víst á, at flokkurin tók undir við oljuleiting í 2001 var við til at tilevna verandi lóg um oljuleiting í 2007 og aftur í fjør. Harumframt hevur tingbólkurin tikið undir við oljuleiting á Drekaleiðini, stendur í fráboðanini.



*Polarhav og Stjørnan koma fullfermd við gulllaksi í morgin. Skipini fara at hava eini 500.000 pund, nú tey koma innaftur at landa Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Gulllaksa-skip sigla fullfermd

**Í gjár landaði Eysturbúgvin í Saltangará, og í morgin koma Polarhav og Stjørnan full undir lúkurnar við gulllaksi**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Gulllaksavertíðin byrjaði tíðliga í ár, og tey fýra skipini, sum higartil eru á gulllaksi, hava fiskað rættiliga væl.

Í gjár vóru Eysturbúgvin og Vesturbúgvin inni. Skipini vóru bæði fullfermd. Eysturbúgvin landaði 240.000 pund í Saltangará, meðan Vesturbúgvin landaði umleið somu nøgd í Vestmanna.

Í morgin koma Polarhav og Stjørnan inn at landa, full undir lúkurnar.

Á landingarmiðstøðini í Saltangará siga tey, at skipini hava eini 500.000 pund tilsamans.

- Jú, tað hevur gingið væl hjá skipunum, síðan tey fóru á gulllaks í ár.

Vestmenningur og Fram, sum eisini fara á gulllaksaveiði, eru ikki lidnir á skipasmiðjuni í Havn, har skipini fáa nýggjar motorar.

Sambært ætlanini skulu skipini verða klár at loysa aftur tíðliga í mai mánaða.

### Aðrar landingar

Hesa vikuna er eingin upsi landaður í Saltangará.

- Trolararnir koma innaftur mánadagin. Tá vænta vit Stelk og Bak sum teir fyrstu - og møguliga Heyk og Falk í hølunum á teimum.

Garnaskipið Oknin landaði eini 10.000 pund av svartkalva í Saltangará í morgun.

# Helvtin innrættast í

**Seinni í ár fær Runavíkar kommuna tveir nýggjar dagstovnar – ein á Skála og ein í Søldarfirði. Felags fyri hesar báðar verkætlanirnar er, at tá stovnarnir verða tikinir í nýtslu seinni í ár, verður bert helmingurin innrættaður. Á henda hátt sparir kommunan í fyrstu syfti einar 5-6 miljónir krónur. Tað er Búsetur, sum stendur fyri hesum arbeiðum, og tá stovnarnir skulu gerast lidnir – kanska í 2010 - verður tað eisini Búsetur, sum kemur at taka um endan**



*Í januar í ár varð dagstovnurin á Skála reistur, og í dag stendur dagstovnurin í Søldarfirði eisini reistur. Báðir stovnarnir verða klárir at taka í nýtslu seinni í ár. Fyribils verður helmingurin av báðum stovnunum innrættaður, og soleiðis sparir Runavíkar kommuna í fyrstu syfti einar 5-6 miljónir krónur*

BYGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Dagstovnurin í Søldarfirði, sum Runavíkar kommuna letur byggja, stendur reistur í morgun. Fløggini eru vundin á stong, og hetta sær hugaligt út í tíðum sum hesum, nú byggivirksemi annars er minkandi.

Tað er Búsetur, sum stendur fyri arbeiðnum í Søldarfirði, har Hallur Hansen er arbeiðsformaður og Oluf í Toft er byggifrøðingur.

Bygningurin í Søldarfirði er at kalla eins við dagstovnin, sum Runavíkar kommuna eisini letur byggja á Skála.

Tað er eisini Búsetur, sum stendur fyri verkætlanini á Skála, ið er komin nakað longri enn verkætlanin í Søldarfirði.

### Tíðarætlan heldur

Hallur Hansen sigur, at bæði arbeiðini ganga væl, og at tíðarætlanin í báðum verkætlanum heldur. Dagstovnurin á Skála verður tikin í nýtslu í oktober/november, og stovnurin í Søldarfirði við ársenda.

Runavíkar kommuna hevur syrgt fyri, at lendið, har stovnarnir verða bygdir, er planerað.

Tað eru átta mans hjá Búsetur, sum taka sær av hesum báðum arbeiðum, og byggifyritøkan hevur somu undirveitarar í báðum støðum.

Hallur Hansen sigur, at Sp/f Stoyp í Gøtu hevur gjørt betongarbeiði, og hetta hevur eydnast fyrimyndarliga.

Aðrir undirveitarar eru Zacharias Leitistein (hvs), Leif Mohr (el), og Ingolf Hansen stendur fyri múraraarbeiðnum, sum eitt nú fevnir um flísalegging og gólvpussing.

- Enn er ikki gjørt av, hvør kemur at taka sær av málaraarbeiðnum og gólválegging. Hesi arbeiði fara vit at bjóða út, sigur hann.

Arbeiðsformaðurin sigur, at so hvørt, sum ein arbeiðstøka er liðug í dagstovninum á Skála, sum annars varð reistur í januar, verður arbeitt víðari í Søldarfirði.

- Stovnarnir eru 750 fermetrar til støddar, og tá báðir standa lidnir, verður pláss fyri 60 børnum á Skála og øðrum 60 børnum í Søldarfirði, bæði í vøggustovu og barnagarði.

Hallur Hansen sigur, at Búsetur hevur gjørt projektini og hevur tillagað tey eftir ynskjum hjá Runavíkar kommunu.

### Spara 5-6 miljónir

Vegna tíðirnar, sum eru, har óvissa er um fíggjarvánir, hevur Runavíkar kommuna gjørt av fyribils at innrætta helmingin av báðum stovnunum, soleiðis at pláss verður fyri 30 børnum í hvørjum staði – og ikki 60, sum verkætlanin annars leggur up til.

Vit spurdu Hall Hansen, hvussu stór fyribils sparingin hjá kommununi er við tað, at báðir stovnarnir ikki verða gjørdir lidnir í einum.

- Eg vænti, at sparingin verður einar 5-6 miljónir krónur. Í sáttmálanum hava vit tryggjað okkum, at tað verður Búsetur, sum kemur at gera stovnarnar lidnar, tá tann tíðin kemur, sigur hann.

Arbeiðsformaðurin væntar, at arbeiðini verða tikin uppaftur í 2010, tá útlit eru til, at fíggjarvánirnar verða betri.

Byggitíðin á Skála og